# Løgmaður mátti skammast

*Løgmaður vil hava dagørt eftirløninar hjá løgmanni og landsstýrismonnunum. Uppskot um hetta er lagt fyri Løgtingið. Tað er toppmált, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag, sum heldur, at hann átti heldur at goldið vaskikonunum á Toll- & Skattstovuni tvey prosent í eftirløn*

Edvard Joensen

Samstundis sum løgmaður leggur uppskot fyri Løgtingið um hækking av landsstýrismannaeftirlønum við 60-70%, noktar Fíggjarmálastýrið at gjalda eftirløn fyri vaskikonurnar á eini deild hjá Toll- & Skattstovuni. Hesar eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað heldur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag vera toppmált. Hon heldur tað vera nógv fyri, at løgmaður skal meta landsstýrismenn vera so nógv meira verdar enn onnur fólk, at teir skulu hava einar 22.000 krónur meira í eftirløn um mánan, enn vanligir pensionistar fáa.

Ingeborg Vinther sigur, at tað er nú nakað síðan, hetta málið við vaskikonunum tók seg upp. Talan var um tvær vaskikonur, sum arbeiða eftir sáttmála hjá Føroya Arbeiðarafelag. Tað almenna hevur góðtikið at løna fólki eftir hesum sáttmála, hóast tey arbeiða hjá almennum stovnum. Og tí varð eisini roknað við, at hesi fólkini fóru at verða lønt eftir eftir sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag. Íroknað tvey prosent eftirlønargjald.

Men soleiðis varð ikki, sigur Ingeborg Vinther. Boð komu úr Fíggjarmálastýrinum, at tað skuldi ikki gjaldast.

Ingeborg Vinther heldur lítið um, at Annfinn Kallsberg, løgmaður, skal koma sær at leggja uppskot um hækking av egnari eftirløn fyri Løgtingið, samstundis sum eitt slíkt mál koyrir.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur lagt uppskot fyri Løgtingið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

Talan er um dagføring av verandi løgmans- og landsstýrismanna eftirlønum, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Tað, sum løgmaður vil við uppskotinum, sigur hann, er at fáa somu skipan at galda fyri landsstýrismenn, sum er galdandi fyri løgtingsmenn. Ein samskipan av eftirlønunum, sigur Anfinn Kallsberg.

Tað er soleiðis, sigur løgmaður, at um ein løgtingsmaður verður landsstýrismaður, byrjar eftirlønaraldurin av nýggjum, tá hann fer í Landsstýrið.

Eftir nýggja uppskotinum skal bera til at samskipa eftirlønina hjá løgmanni og landsstýrismonnunum, so tað verður framhald í soleiðis, at ein ikki missir av eftirlønini, um ein gerst landsstýrismaður.



*Ingeborg Vinther heldur tað vera toppmált, at løgmaður nú ætlar at hækka pensjónirnar hjá landsstýrismonnum*

# Hjartað á røttum stað

*Lions Club í Vágum hevur latið Vága Bjargingarfelag eitt hjartatól at hava í sjúkrabilinum í Vágum. Tólið mátar EKG, blóðtrýst, súrevni í blóðinum og kann setast beinleiðis í samband við Landssjúkrahúsið*



*Lionsformaðurin í Vágum, Heini F. Petersen, hm. handar Tórhalli Simonsen, formanni í Vága Bjargingarfelag, hjartatólið*
**Mynd: Edvard Joensen**

Edvard Joensen

Lions Club í Vágum hevur latið Vága Bjargingarfelag ein sonevndan defibrilator, ella eitt hjartatól, sum leyvurnar í Vágum nevna tað. Tólið varð handað formanninum í Bjargingarfelagnum á Giljanestiltakinum hjá Lions Club føstulávintssunnudag.

Heini F. Petersen, formaður í Lions Club í Vágum, handaði Tórhalli, Simonsen, formanni í Vága Bjargingarfelag, tólið. Heini F. Petersen sigur, at tólið er keypt fyri pening, sum Lions Club hevur savnað inn seinastu tvey árini. Hetta tólið, sum er sera framkomið tekniskt, kostar góðar 100.000 krónur.

Í samband við handanina var Jógvan Jensen, portørur, komin úr Havn at greiða frá tólinum, og hvat tað skal brúkast til.

Jógvan Jensen sigur, at talan er um ein defibrilator, stoytgevara, við EKG monitori. Tað serliga við hesum tólinum er, at tað við einum modemi kann koblast til Landssjúkrahúsið, haðani ein serlækni so kann sita og ráðgeva kommunulæknanum ella portørinum, sum stendur við sjúklinginum vesturi í Vágum.

Jógvan Jensen, portørur, leggur tó dent á, at hetta ikki er nakað, sum bara verður gjørt soleiðis uttan víðari. Tað skulu takast avgerðir hjá rætta viðkomandi um hetta, áðrenn tað yvirhøvur kann koma upp á tal. Eisini skulu fólkini, sum skulu arbeiða við hesum tólinum, lærast at brúka tað.

Tað vísir seg, sigur Jógvan Jensen, at ein stórur partur av teimum sjúklingum, sjúkrabilarnir fara eftir, eru fólk við hjartatrupuleikum. Og tá er tað gott at kunna geva skjóta viðgerð. Tað kann til dømis vera stórur munur á at kunna byrja viðgerðina, meðan sjúklingurin enn er í Sørvági, enn um bíðast skal til hann er komin til Havnar.

Tað er, sum sagt, Lions Club í Vágum, sum hevur latið tólið. Tað er ein partur av arbeiðinum hjá Lions at lata pening til góðgerandi endamál. Sjálvandi eru eisini aðrar útreiðslur hjá felagnum, sum peningur skal fáast til vega til. Og tað verður gjørt á so ymsan hátt.

Hjá leyvunum í Vágum er sonevnda Giljanestiltakið ein árliga afturvendandi táttur. Heini F. Petersen, formaður í Lions Club í Vágum, sigur, at teir plaga at hava hetta tiltakið føstulávintssunnudag. Og hann letur at, at tiltakið fær góða undirtøku frá vágafólki. Í ár komu meira enn 180.000 krónur inn brutto. Her skal so sjálvandi nakað av aftur, men ein fittur biti man kortini fara at liggja eftir, vænta teir.

Heini F. Petersen vísir á, at tað er tó ikki bara sjálvum lionslimunum fyri at takka, at tiltøkini ganga so væl. Sum ikki einaferð standa konurnar aftan fyri og taka tøk, sigur hann. Og hann leggur aftrat, at tað eiga tær stóra tøkk uppiborna fyri.



# Funnu onga breiða semju

*Breið semja fanst ikki í uttanlandsnevndini fyri fullveldisætlanunum. Tilmælini verða latin landsstýrinum í dag eftir døgurða*



John Johannessen

Tá landsstýrið í dag eftir døgurða fær handað tilmælini í fullveldismálinum, verða tey trý í tali. Eitt frá samgonguflokkunum, eitt frá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum og eitt frá Miðflokkinum. Sostatt er nógv umrødda breiða semjan, ið skuldi finnast í uttanlandsnevndini fyri ætlanum landsstýrisins, ikki rokkin.

Tá uppritið til ríkisrættarligu samráðingarnar fór í uttanlandsnevndina at verða viðgjørt, søgdu løgmaður og varaløgmaður seg vera vísar í, at nevndin fór at finna eina breiða semju í málinum. Teir væntaðu helst, at Miðflokkurin fór at taka undir við fullveldisætlanini, somuleiðis sum teir eisini roknaðu við at fáa Javnaðarflokkin við. Vónirnar fyri, at Sambandsflokkurin fór at taka undir við ætlanini vóru kortini ikki tær heilt stóru.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava, eftir fleiri fundir seinastu tíðina millum leiðslur floksins, funnið fram til eitt felags tilmæli, ið flokkarnir løgdu fyri uttanlandsnevndina í gjár.

Javnaðarflokkurin boðaði á eyka landsfundi herfyri frá, at hann ikki tekur undir við ætlan landsstýrisins, og tí ikki fór at stuðla henni. Men flokkurin hevur tó boðað frá, at hann ynskir meira sjálvstýri. Hann vil yvirtaka málini, so hvør føroyingar eru førir fyri tí, í staðin fyri at taka yvir øll mál, eins og landsstýrið vil.

Sambandsflokkurin vil eisini broytingar, um ikki so víðgongdar, sum Javnaðarflokkurin. Men kortini hava hesir báðir flokkar á einhvønn hátt funnið saman í fullveldismálinum

Í sambandi við, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava arbeitt saman um felags álit, hevur Jenis av Rana ført fram, at fór hetta at verða veruleiki, er breiða semjan longu funnin, tí tá hevur Javnaðarflokkurin togað Sambandsflokkin langt á slálvstýrisleið. Miðflokkurin sigur seg virða samráðingarrættin hjá landsstýrinum, men hevur kortini skrivað sítt egna álit. Hetta heldur hann vera skilabest, hóast flokkurin, eins og samgongan, vil hava broytingar í ríkisrættarligu støðuni.




# Uppritið almannakunngjørt

John Johannessen

Klokkan hálvgum tvey í gjár hittust landsstýrisfólk og tinglimir til tingfund. Og júst tá kunnaði landsstýrið teir tinglimir, ið eisini eru limir í uttanlandsnevndini, um, at tað fór at taka trúnaðarstemplið á uppritinum til ríkisrættarligu samráðingarnar aftur, so at uppritið var alment eftir klokkan tvey.

Landsstýrið metir nevniliga viðgerðina av málinum at vera lidna, hóast tað ikki bar til at fáa málið formliga avgreitt í gjár, tá formaður nevndarinnar fekk forfall.

Enn vantar tó, at seinastu undirskriftirnar verða settar á tey trý tilmælini frá uttanlandsnevndini, og tí verða tey ikki almannakunngjørd fyrr enn eftir fundin í uttanlandsnevndini seinnapartin í dag, tá málið verður endaliga avgreitt.

Efir at landsstýrið hevur nærlisið tilmælini verður tíðindafundur hildin í Tinganesi um, hvat víðari fer at henda í fullveldismálinum og, hvørja kós landsstýrið fer at velja í samráðingunum. Hesin tíðindafundurin verður hósdagin klokkan ellivu fyrrapartin.

# Formaðurin innlagdur

*Formaður uttanlandsnevndarinnar varð í gjár í skundi lagdur inn á Landssjúkrahúsið. Tí eru tilmælini til uppritið um samráðingar við danir aftur útsett*



John Johannessen

Uttanlandsnevndin fekk ikki endaliga avgreitt fullveldismálið, eins og ætlað, á fundinum gjáramorgunin.

Orsøkin til hetta var, at formaður nevndarinnar, Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum, brádliga fall um umborð á Smyrli á veg norður á fund og varð fluttur á Landssjúkrahúsið.

Varamaður Tjóðveldisfloksins í uttanlandsnevndini er Jógvan Durhuus, og tá hesin var staddur í Danmark og tískil heldur ikki kundi møta, var Tjóðveldisflokkurin ikki umboðaður á fundinum í uttanlandsnevndini fyrrapartin í gjár.

Tískil var bert stuttur fundur hildin undir leiðslu av varaformanninum, Heðini Mortensen úr Sambandsflokkinum. Á hesum fundi var gjørt av at halda endaliga fundin í dag klokkan eitt. Tá er Jógvan Durhuus komin úr Danmark, og tískil ber tá til hjá Tjóðveldisflokkinum, eins og hinum flokkunum at skriva undir tilmæli til landsstýrið.

Tað ber nevniliga bert til hjá valdum varalimi at møta til fundir í uttanlandsnevndini, tá uttanlandsnevndarlimur fær forfall.

Tá Sosialurin tosaði við umboð fyri Tjóðveldisflokkin á middegi í gjár, fingu vit at vita, at Hergeir Nielsen liggur á B8 á Landssjúkrahúsinum, ið er intensiv deild. Støðan hjá formanni uttanlandsnevndarinnar var stabil, hóast hann var heldur illa fyri.